# Lesið eina góða bók

Hjá nógvum eru jólini bjargað, um ein góð bók liggur undir trænum. Tá hava vit endiliga tíð til at seta okkum afturá at lesa til bókin er liðug og rópt verður "ger so væl" til næstu máltíð.

**Lagt til rættis:** Rigmor Dam

## Til tey natúrligu

**FØROYA NÁTTÚRA**
Yrkisbók
Føroya náttúra - Lívfrøðiligt margfeldni
Anna Maria Fosaa - Eilif Gaard - Jóannes Dalsgarð
Forlag Føroya Skúlabókagrunnur
350 krónur
270 blaðsíður
380 krónur




Bókin Føroya Náttúra gevur eina mynd av lívfrøðiliga margfeldinum í føroysku náttúruni, so vit kunnu lesa um støðuna hjá plantum og djórum í Føroyum.

Bókin er í fyrsta lagi ein lýsing av Føroya náttúru fyri einum breiðum lesaraskara, har 20 lívfrøðingar hava skrivað og lýst sín part av føroysku náttúruni. Hugskotið til bókini kom eftir at Føroyar í 1992 skrivaðu undir ST-samtyktina Agenda 21, um varðveitslu og skráseting av lívfrøðiligum margfeldi.

## Til tey samfelagsligu

**JANA - EITT HJARTABARN**
Dokumentar
Jana - eitt hjartabarn
Tórun Ellingsgaard
Forlagið Elri
248 blaðsíður
349 krónur




Í seinnu helvt av sekstiárunum vóru 110 evnaveikir føroyingar á stovni í Danmark, harav eini 80 á Rødbygaard. Sorgarleikurin er, at nógv teirra, sum vórðu send á stovn í Danmark, ikki áttu at verið goymd burtur á slíkan hátt. Við einum sindri av stuðli, høvdu nógv teirra klárað seg væl í Føroyum. Men, her vóru umstøðurnar ymiskar og fordómarnir stórir. Jana var so heppin at hava foreldur, sum vildu geva henni ein góðan uppvøkstur her heima, og tað er millum annað hetta stríð vit lesa um í bókini.

## Til tey sunnu

**LÆTT & LESKILIGT 2'ARIN**
Matgerð
Lætt & Leskiligt 2'arin
Jóhanna á Tjaldrafløtti - Elisabeth Akursmørk
Forlagið Elri
Egið forlag
164 blaðsíður
290 krónur




Hetta er framhaldsbók av Lætt & Leskiligt, ið kom út í oktober 2003. Aftur hesaferð er talan um eina leskiliga kókibók við heilsugóðum og vælsmakkandi mati. 2'arin avspeglar matrákið í nútíðarsamfelagnum við nýggjum og spennandi uppskriftunum og við meira fjøltáttaðum rávøruúrvali. Bókin hevur eins og tann fyrra, einfaldar uppskriftir uppá lættan og leskiligan. Talan er um soltnan og heilsugóðan mat, ið er ætlaður øllum, eisini teimum, ið hava diabetes og hjarta- og aðrasjúkur.

## Til tey listaligu

**MIKINES**
List
Mikines
Aðalsteinn Ingólfsson
Nesútgáfan í Íslandi
315 blaðsíður
695 krónur




Bókin um lívið og listina hjá S.J. Mikines er mest umfatandi verkið um listamannin higartil. bókin kastar nýtt ljós á lívið hjá Mikines og hevur hon eisini eina sera umfatandi savn av myndum. Nógv av verkunum, ið verða víst í bókini eru ikki áður almannakunngjørd. Harumframt er eitt yvirlit yvir allar sýningar, ið Mikines luttók á. Bókin kemur út á føroyskum, donskum og enskum. Aðalsteinn Ingólfsson hevur skrivað størsta partin av verkinum, tó hava eisini Bárður Jákupsson og Bent Irve staðið fyri nøkrum tekstum.

## Til tey Klaksvíksligu

**ZISKATRØÐBREKKAN**
Fólkaminni
Ziskatrøðbrekkan
Christoffer Jensen
Egið forlag
282 blaðsíður
240 krónur




Barnaminni úr Klaksvík í fimmtiárunum. Tað er klaksvíkingurin Christoffer Jensen sum fortelur frá hesi turbulentu broytingartíðini við politiskari frustrasjón, sosialari ónøgd, arbeiðsloysi og læknastríði, soleiðis sum hann sjálvur upplivdi hetta tíggjuára skeiðið. Bókin ber heitið "Ziskatrøðbrekkan", við tað at snúningsásin í frásøgnini er "brekkan", har høvundurin vaks upp í Klaksvík. Forsíðumyndin er av børnum í fimmtiárunum á Biskupsstøð.

## Til tey forvitnu

**ALI BABBA – OG 49 AÐRAR BLAÐGREINIR**
Greinasavn
Ali babba
Høgni Mohr:
Egið forlag
298 blaðsíður
350 krónur




Greinasavnið hjá viðurkenda tekstsmiðinum Høgna Mohr er á tremur við ærligum menniskjum. Har eru 65 kend fólk, sum øll í samrøðu við Høgna Mohr hava nektað seg, so onnur kanska kunnu læra. Opinskáraðu tekstirnir á teimum mongu myndprýddu síðunum spenna heilt frá greinini um forfylgda formannin í búskaparráðnum til raskar vinnulívsrisar og síðan yvir til veingjaðu hetjuna, sum summi í einskæraðari øvundsjúku kallaðu Kamikaze-Hans. Og ímillum hetta eru mangar aðrar spennandi lagnur og lívssøgur.

## Bestseljaralisti yvir danskar bøkur – vika 47 (Rit og rák)

1) Tankados Kode: Dan Brown
2) Vi, de druknede: Carsten Jensen
3) Nynnes dagbog: 3 Henriette lind
4) Madame Terror: Jan Gouillou
5) Den ukendte hustru: Leif Davidsen
6) Nobels testmente: Liza Marklund
7) Pigen der legede med ilden: Stieg Larson
8) Skæbnegalleriet: Helle Stangerup
9) De ti herskere: Christian Mørk
10) Hushjælp søges: Sophie Kinsella